**Semja millum Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna**

**og**

**Fíggjarmálaráðið**

1. Sáttmálaskeið

Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober 2022 til 31. desember 2025.

2. Lønarhækkingar
   - Tann 1. oktober 2022 hækka mánaðarlønirnar 3,8%.
   - Tann 1. januar 2024 hækka mánaðarlønirnar 4,0%.
   - Tann 1. januar 2025 hækka mánaðarlønirnar 4,75%

3. Broytt lønargongd
   - Lønarstig 3 verður tikið úr lønargongdini hjá handverkarum tann 1. januar 2024. Handverkarar sum standa á hesum stigi tann 1. januar 2024 verða fluttir á nærmasta hægri stig, og standa á hesum stiginum í eitt ár, áðrenn teir flyta á næsta stig í lønargongdini.
   - Lønarstig 5 verður tikið úr lønargongdini hjá handverkarum tann 1. januar 2025. Handverkarar sum standa á hesum stigunum tann 1. januar 2025 verða fluttir á nærmasta hægri stig, og standa á hesum stiginum í eitt ár, áðrenn teir flyta á næsta stig í lønargongdini.
   - Við gildi frá 1. oktober 2024 verður stig 1 strikað úr lønargongdini. Handverkarar, sum eru á stig 1, flyta á stig 2 – og fáa nýggjan dag fyri starvsaldursbroyting.
   - Handverkarar, ið tann 1. oktober 2024 hava staðið minst 12 mánaðir á stig 11, flyta á stig 12.
   - Tann 1. januar 2024 verða leiðandi handverkarar fluttir av stig 16 og á stig 18.
   - Tann 1. oktober 2024 verða formenn hjá Landsverki løntir á stig 21 og 22. Teir, sum hava verið í hesum starvinum í longri enn eitt ár verða fluttir á stig 22.

4. Nýggj flokking galdandi frá 1. januar 2024:
   Leiðandi handverkari 2 (formaður). Gongur stigini 19, 20 og 21.

   Viðm. einstaki arbeiðsgevarin avgerð í samráð við Fíggjarmálaráðið, hvørt talan er um leiðandi handverkara ella leiðandi handverkara 2.

   Tá ið metingin verður gjørd verður dentur lagdur á ábyrgdarøkið, vavið og slagið av arbeiðsleiðslu.

5. Avtalan um formenn hjá Landsverki er dagførd, sí hjáløgdu avtalu.

*Broytingar í sáttmálatekstinum*

6. § 1, stk. 2 verður soljóðandi:
   "Tá ið starv er leyst, verður tað alment lýst leyst at søkja. Um starvstíðin er styttri enn 6 mánaðir, tá er ikki neyðugt at starvið verður lýst leyst alment."

7. Ásetingar um lærlingar. Galdandi frá 1. januar 2024
   § 3, stk. 7 Lærlingar verða 1., 2., 3. og 4. læruárið løntir við ávikavist 40, 50, 60 og 70 % av byrjanarlønini fyri útlærd. Er lærutíðin styttri enn 4 ár, verða seinastu lønarstigini nýtt, soleiðis at seinasta heila læruár verður lønt eftir 4. lønarstigi (70 %). Er lærutíðin longri enn 4 ár, verður lønin eftir 4. læruár 80 % av lønini fyri útlærd.

   § 3, *stk. 8.* Tá ið lærlingurin fer í skúla um dagin, verður givið honum frítt at fara í arbeiðstíðini, uttan at tíðin verður frádrigin í løn hansara. Verður skúlagongdin uttanfyri vanligu arbeiðstíðina, skal hetta gevast aftur í vanligum tímatali. Fer skúlagongdin fram frídagar ella leygardagar, skal lærlingurin hava samsvarandi frítíð onkran av yrkadøgunum.

   *§ 3, stk. 9* Hava lærlingar undantaksvís yvirarbeiði, fáa teir yvirtíðarløn á 1. stigi í lønarflokkinum, teir koma í, tá ið teir eru útlærdir.

8. Nýtt § 6, stk. 7:
   Tá yvirtíðararbeiði endar og tað eru færri enn 6 tímar til byrjað verður aftur at arbeiða, verður ikki farið niður í løn.
   Galdandi frá 1. februar 2024.

9. Í § 7 a, stk. 3 verður lagt afturat: "Gjaldið fyri tilkallivakt verður goldið frá tí, at tilkallivaktin tekur við til hon endar."

10. § 19. Stk. 5 verður broytt soleiðis:
    Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín. Hesar 10 vikurnar við løn kunnu liggja innan alt farloyvistíðarskeiðið tó eftir viku 14.

    Hendan ásetingin fær gildi fyri børn fødd eftir 1. oktober 2024.

11. Í § 20 verður lagt afturat, "Eftirsitiløn verður eisini goldin til samlivandi."
    Galdandi frá 1. januar 2024.

12. Dagføring
    Lønartalva og sáttmáli verða dagførd samsvarandi omanfyristandandi.

*Í Tórshavn tann 22 desember 2023*

**Føroya Handverkarafelag** | **Fíggjarmálaráðið**

Landsfelag Handverkaranna